ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

16. november 2023
J.nr: 23/18898-12
Tygara skriv:
Viðgjørt: Heri Petersen

Viðvíkjandi fíggjarligum avleiðingum í sambandi við løgtingsmál nr. 21/2023

Á fundi í Trivnaðarnevndini tann 9. november varð landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum spurd um fíggjarligar avleiðingar, um frádráttarfría inntøkuupphæddin verður hægri enn tær 61.900 kr., sum løgtingslógaruppskotið leggur upp til.

Fyrst skal gerast vart við, at tað bert ber til at gera eina ógvuliga leysliga meting. Metingin byggir á inntøkuupplýsingar fyri 2022. Tað merkir, at metingin vísir fíggjarligar avleiðingar, soleiðis sum tær høvdu verið, um frádráttarfría inntøkuupphæddin varð broytt í 2022. Fyrst og fremst eru fleiri fólkapensjónistar í 2024, enn tað vóru í 2022. Eisini eru fleiri pensjónistar, sum hoyra til nýggju pensjónsskipanina í 2024 enn í 2022. Og hækking í frádráttarfríu inntøkuupphæddini hevur størri fíggjarligar avleiðingar fyri nýggju pensjónsskipanina. Alt hetta merkir, at veruligu fíggjarligu avleiðingarnar í 2024 verða størri enn upphæddirnar niðanfyri.

Í løgtingslógaruppskotinum verður mett, at ein hækking í frádráttarfríu inntøkuupphæddini í fer at hava við sær, at útreiðslur til fólkapensjón fara at hækka við uml. 6,5 mió. kr. í 2024. Hendan metingin hevur somu fyrivarni, sum eru lýst omanfyri, og veruligi meirkostnaðurin verður tí hægri enn 6,5 mió. kr.

Ein hækking í frádráttarfríu inntøkupphæddini hevur hesar fíggjarligu avleiðingar í 2024:

Frádráttarfrí inntøkuupphædd	
70.000	10 mió. kr.
80.000	14 mió. kr.
90.000	17 mió. kr.
100.000	20,5 mió. kr.

Tað skal undirstrikast, at talan er um eina meting fyri 2024. **Árini frameftir verða fíggjarligu avleiðingarnar munandi hægri enn talvan vísir omanfyri.** Flestu fólkapensjónistar fara yvirhøvur at fáa ágóðan av broytingini, tí nærum allir fólkapensjónistar fara at hava egna pensjónsuppsparing, sum verður mótroknað í. Havast skal eisini í huga, at talið av fólkapensjónistum hækkar á hvørjum ári.

Almanna- og mentamálaráðið

Heri Petersen
fulltrúi